# Spenningurin í hæddini



*Tað var kanska óvæntað, at StÍF skuldi vinna somikið sannførandi á Kyndli seinasta vikuskiftið, men hetta var í grundini bert ein staðfesting av styrkini, sum strandingar tykjast hava í løtuni*

**Spenningurin hevur sjáldan verið so í bestu mansdeildini, sum hann er júst í løtuni. Nú grundspælið er liðugt, standa trý lið á jøvnum, og hvørki Kyndil ella KÍF eiga at avskrivast heilt**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey bæði seinastu árini hevur tað gjarna verið soleiðis, at vestmenningar longu við ársskifti hava skilt seg somikið greitt út frá restini, at gullmerkini at kalla bert hava verið formalitetir. Fyri spenningin í hondbóltskappingini er tað tí ein gleðilig støða, sum nú er íkomin. StÍF, Neistin og VÍF byrja nevnliga øll við níggju stigum, tá farið verður undir endaspælið, og sostatt er alt fullkomuliga opið, nú helmingurin av kappingarárinum er runnin.

Seinasta vikuskiftið undan jólunum vórðu teir tríggir seinastu dystirnir í grundspælinum leiktir, og har eydnaðist tað StÍF og Neistanum at staðfesta oddastøðuna við tryggum sigrum á ávíkavist Kyndli og KÍF.

Kanska var tað eitt sindur óvæntað, at StÍF skuldi vinna somikið greiðan sigur á Kyndli, men sum skilst, so var ongan tíð nakar sum helst ivi um, hvat av liðunum var tað betra hendan dagin.

Kyndil fylgdi hampuliag væl við fyrstu 10 minutt-irnar ella so, men so fóru teir í jólafrí, og tað revsaðu strandingar við manér. Serstakliga Sveinur Justinussen – gerst bara betri fyri hvønn dyst – gjørdi um seg, og grønu gestirnir vistu snøgt sagt ikki síni livandi ráð, tá langlimaði unglingin riggaði til til hoppiskotini.

Í Havn var skilið á leið hitt sama, tá KÍF vitjaði Neistan. Kollfirðingar hava annars verið ein hampuliga stór hóttan móti ovaru støddu liðunum, men eins og hjá Kyndli, so fóru teir dekan ov tíðliga í jólafrí. At støðan eftir fyrra hálvleik var 17-4 til Neistan, sigur helst alt um, hvussu lítið KÍF hevði at bjóða uppá, og so munar tað lítið, at teir iðraðu seg um trý misnýtt brotskøst á rað. Hesi høvdu í besta føri pyntað um úrslitið, tí spenningurin í dystinum var fyri langt síðani fokin, tá hetta hendi.

Seinasti dysturin var botnslagið í Runavík, har Tjaldur og H71hitturst. Sum tað hóskar seg eini somikið javnari uppgerð, so endaði alt við javnleiki, men tað var so ikki uttan dramatikk, at so varð. Í seinasta minuttinum av dystinum høvdu hoyvíkingar annars lagt seg á odda við tveimum málum, men teir megnaðu ikki at halda høvdið kalt seinastu løtuna, og so kundi Zoran Sarcevic vera ísakaldur, tá hann í seinastu sekundunum hevði møguleikan at vinna eitt stig heim av brotskastblettinum.

### Landsliðsávirkanin

Sum grundspælið hevur lagað seg, so er sjálvandi ilt at meta um nakran favoritt til FM-heitið, men skal nakað lið takast framum, so má tað helst verða StÍF.

Kanska hava avrikini aftur í vetur verið eitt sindur óstøðug, men í mun til undanfarnu vetrarnar er tó ein stórur bati í hesum. Og tá teir eru á toppinum, so megnar liðið sum einki annað í Føroyum kynstri at spæla skjótan og effektivan hondbólt. Við leikandi venjaranum og unga Sveini Justinussen hevur liðið eisini tvær av avgjørt størstu stjørnunum í føroyskum manshondbólti, soleiðis at liðið eisini hevur leikararnar, sum kunnu avgera, tá spælið onkrar dagar ikki koyrir.

Slíkar leikarar hav vestmenningar fleiri av, og tað er kanska fyrst og fremst hesir, sum hava gjørt, at liðið framvegis er somikið væl við. Í øllum førum er tað hent rættiliga ofta, at spælið hjá VÍF ikki hevur koyrt eftir vild, men við skjúttum sum Inga og Áka Olsen kunnu mótstøðuliðini ongan tíð kenna seg heilt trygg.

Seinasta liðið í oddinum er Neistin, og bara tað at teir eru her, er í sjálvan sær fullkomuliga óvæntað. Árið í ár skuldi annars bara roknast sum ein roynd at spæla eitt nýtt lið saman, eftir at fleiri stórir profilar eru farnir av liðnum í mun til í fjør. Støðan í løtuni er tó tann, at Neistin nú er betri fyri, enn teir vóru fyri einum ári síðani, ogh einki er at ivast í, at hetta er nakað, sum togar smílini fram í bláu búnunum. Hvørt liðið verður eins frammarliga, tá endaspælið er av, kann sjálvandi ikki sigast enn, men verður hildið fast við positiva hugburðin til spælið, og megna Áki Mørk og Morgan Knezevic at halda støðinum frá grundspælinum, so er einki ógjørligt. Og so skal eisini minnast til, at John Petersen nú eisini er á liðnum, so hóast alt, so hava Neistamenninir eisini einstaklingarnar, sum kunnu avgera tøttu dystirnar, sum altíð vilja koma.

Og so kann tað eisini vísa seg at gerast avgerandi fyri gullstríðið, hvussu landsliðsleikararnir úr ymsu feløgnum tørna út eftir landsdystirnar, og ikki minst hvussu teir, sum ikki eru á landsliðnum, taka uppgávuna tá bíðað verður. Ein líknandi støða var fyri tveimum árum síðani, og tað ferðina var sólarklárt, at landsliðsleikararnir vóru so nógv betri fyri, tá kappingin byrjaði aftur.

Verður støðan tann sama í ár, er ikki óhugsandi, at VÍF mest sum setir turboløðaran til, tá farið verður undir aftur kappingina, og um so er, so vildi tað í øllum førum verið spell fyri spenningin, sum er uppbygdur higartil. Ein spenningur, sum ikki hevur sæð sín líka seinastu mongu árini, og sum ivaleyst kann gera sítt til, at ymsu høllirnar kring landið verða fullsettar, nú avgerandi dystirnir av álvara fara ígongd.

## Úrslit – manshondbóltur

**StÍF-Kyndil 33-21 (15-9)**

Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 12(3), Jón Rasmussen 5, André F. Danielsen 4, Alexandur Johansen 3, Artur Johansen 3, Costin Dumitrescu 3, Bent Djurhuus 2, Kristian Peturssopn 1, Pauli Hansen 1
Kyndil: Hanus Jensen 4, Høgni Klein 4, Jónleif Sólsker 3(2), Heini Bendtsen 3, Jacob Jónsson 2(1), Ken Zachariasen 2(1), Finnur Hansson 2, Josef Abrahamsen 1
Brotskøst: StÍF 4, Kyndil 7
Útvísingar: StÍF 3, Kyndil 3
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen

**Neistin-KÍF 33-18 (17-4)**

Málskjúttar:
Neistin: John PEtersen 10(2), Morgan Knezevic 8, Helgi Justinussen 5, Ragnar Stakkstund 4, Dan Thorleifsson 3, Jón Ludvig 2, Birgir Kass 1
KÍF: Damir Oros 7(1), Mirko Milinkvic 5(3), Rógvi Weihe 2, Finn Heri Johansen 2, Petur Martin Poulsen 1, Vagnur Johannesen 1(1), Hallur Hansen 1
Brotskøst: Neistin 2, KÍF 9
Útvísingar: Neistin 4
Dómarar úr H71: Hallur Danielsen & Jákup Símun Simonsen

**Tjaldur-H71 34-34 (18-15)**

Málskjúttar:
Tjaldur: Dragisa Stojovic 12(4), Jens Martin Knudsen 5, Tórhallur Thomsen 4, Arnfinn Langgaard 4, Zoran Sarcevic 4(1), Sverri Justinussen 3, Mortan Hansen 2
H71: Esbern Patursson 9, Bjarni Wardum 8(6), Halgir Dahl Olesen 5, Johnny Durhuus 5, Niels Viggo Niclasen 4, Hans J. Jacobsen 3
Brotskøst: Tjaldur 6, H71 6
Útvísingar: Tjaldur 4, H71 5
Diskvalifikatión: H71 1 (Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.



# ÍF heldur oddastøðuna



*ÍF vann oddaslagið ímóti TB, og løgdu seg sostatt einsamallar á odda, meðan TB fyri fyrst má taka til takkar við einum triðja plássi*

**TB kiksaði fyri triðju ferð í ár ímóti ÍF, og á Giljanesi vann Fleyr óvæntaðan sigur á Drátti**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Endaspælið hjá kvinnunum byrjaði vikuskiftið fyri jól, og alt fyri eitt stóð toppuppgerð á skránni.

Úr TB vóru boðini eftir grundspælið, at nú skuldu restina av dystinum vinnast, men longu í fyrst royndini miseydnaðist hetta, og enn einaferð vóru tað ÍF, sum gjørdu av við TB.

Báðu ferðirnar liðini hittust í grundspælinum, eydnaðist tað ÍF at vinna sær stigini, og nú stigini av álvara eru farin at telja, eydnaðist tað aftur hjá fuglfiriðngunum, sum sostatt hava lagt seg á odda í bestu deildini. Talan var tó ikki um nakran lættan sigur, men í fimta og avgerandi settinum var tað sum um, at ÍF nú hevur fingið sálarligu yvirvágina á TB, og tað var fyrst og fremst hendan, sum gjørdist avgerandi.

Á Giljanesi var Fleyr á vitjan, og roknað varð við, at hetta at kalla var avgreiðsluspurningurin hjá Drátti. Fleyr tók tó heimaliðið fullkomuliga á bóli, tá tær vunnu sín bara næsta sigur á árinum, og við hesum lyftu seg av niðasta sessinum, har tær annars hava hildið til, síðani tær taptu seinna dystin móti KÍF í grundspælinum.

Hitt botnliðið, KÍF, megnaði ikki at gera stórvegis, tá Mjølnir vóru á vitjan hjá teimum. Úrslitið gjørdist ein sannførandi 3-0 sigur til Mjølnir, sum soleiðis halda fast í síni avbjóðing til gullmerkini, sum nú hava verið í útlegd úr Klaksvíkini í tvey ár.

Enn er tó einki avgjørt. Fuglfirðingarnir eru kanska tær, sum eru best fyri, men bæði TB og Mjølnir eru framvegis somikið væl við, at alt má sigast at vera opið.

Hvussu tað fer at tørna út, tá alt veruðr talt sama veldst í stóran mun um, hvussu tað fer at ganga í innanhýsis dystunum millum oddaliðini.

# Silvurstríðið mest sum javnt

**Fram vann týdningarmikla dystin á Mjølni, soleiðis at tað enn bert er eittans stig, sum skilir liðini frá øðrum til fjórða pláss**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at klaksvíkingar munnu iðra seg um úrtøkuna í seinatu báðum dystunum. Fyrst taptu teir seinasta dystin í grundspælinum, soleiðis at SÍ slapp at troka seg upp í silvurstríðið, og fyrsta dystin í endaspælinum vóru teir greitt við undirlutan, tá teir vitjaðu hjá Fram.

Við sannførandi 3-1 sigrinum legði Fram seg í fyrstu atløgu á næst ovasta sessin á stigatalvuni, og tað er ikki óhugsandi, at teir eisini vera at finna her, tá stigini verða løgd saman endaligt. Í øllum førum hava havnarmennirnir sýnt sera góð avrik í seinastuni, har teir millum annað tvingaðu fuglfirðingarnar út í ein fimm-settara, og tað er í øllum førum meira, enn nakað annað lið hevur megnað.

Hitt havnarliðið, Fleyr, hevur tað hinvegin ikki nakað serligt í løtuni. Teir vóru hesa ferð á vitjan í Sørvági, og eins og undanfarnu átta ferðirnar gjørdist talan um eitt 0-3 tap hjá teimum. Sørvingarnir vóru annars eina løtu í vanda fyri at detta púrasta burtur ímillum í kappingini um silvurið, men við seinastu sigrunum hava teir nú strítt seg upp á liðina av klaksvíkingum, og eru sostatt bert eittans stig aftanfyri Fram.

Gullstríð verður talan neyvan um í ár, soleiðis sum ÍF hevur skikkað sær, men um silvurið er spenningurin framvegis so stórur, sum hann á nakran hátt kann verða.

## Flogbóltsúrslit

| Meistaradeild kvinnur | Meistaradeild menn |
|---|---|
| IF-TB 3-2 | Fleyr-SÍ 0-3 |
| KÍF-Mjølnir 0-3 | Fram-Mjølnir 3-1 |
| Dráttur-Fleyr 1-3 | |

## Úrslit-kvinnuhondbóltur

Tjaldur-VB 20-32 (10-18)
**Málskjúttar:**
Tjaldur: Milica Ergic 6(2), Lenka Ribaric 6, Oddvá Fossdalsá 3, Kristine Ellingsgaard 2, Anna Mari Østerø 1, Heidi Heinesen 1, Mona Langgaard 1
VB: Arnleyg Hjelm 8, Daiva Toumaite 7, Guðrun Midjord 5, Laila Jespersen 5, Reda Kurkaskiene 4, Eyðdis Kjærbo 2, Anja Magnussen 1
Brotskøst: Tjaldur 3, VB 1
Útvísingar: Tjaldur 2, VB 1
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.

Neistin-Stjørnan 20-23 (10-12)
**Málskjúttar:**
Neistin: Súna Mørk 7(2), Simona Dziugyte 6(5), Mildrið Jacobsen 2, Anna Clementsen 2, Susan Brockie 2, Ása á Neystabø 1
Stjørnan: Una Olsen 7, Danijela Ercevic 5(2), Natasha Stamenkovic 4, Jastrid Gullaksen 2, Bára S. Klakstein 2, Súsanna Hansen 1, Rannvá Andreasen 1, Irdi Mikkelsen 1
Brotskøst: Neistin 10, Stjørnan 2
Útvísingar: Nistin 1, Stjørnan 4
Dómarar úr H71: Hallur Danielsen & Jákup Símun Simonsen.

StÍF-Kyndil 24-28 (12-14)
**Málskjúttar:**
StÍF: Alia Olaru 8, Poula D. Olsen 5(1), Asta Petrauskiene 5(3), Signhild Petersen 2, Anna B. Danielsen 2, Sunfríð B Jacobsen 1, Anna M. Berthelsen 1
Kyndil: Annika Thomsen 9, Ileana Manolescu 8(5), Annika Ljósstein 4, Sonja Smiljic 3, Marjun Tróndarson 1, Ann Mari Vang 1, Heidi Maria Akselsen 1, Jensia Petersen 1
Brotskøst: StÍF 9, Kyndil 5
Útvísingar: StÍF 2, Kyndil 1
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansn & Sámal Hansen.